TING-HELLAN

# Sundstein er ímóti at land

**Eftir fyrilestrarnar hjá Peturi Zachariassen, hagfrøðingi, í vetur um valskipanina og møguligar broytingar, var nakað av orðaskifti um málið. Síðani hevur einki verið at hoyrt, og nú hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at innlendismáláráðið hevur ikki arbeiðsorku at fyrireika uppskot til broytingar. Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgtingsmaður, landsstýrismaður og løgmaður sigur seg ivast nógv í, um tað er rætt í valskipanin av avmarka ella avtaka leiklutin, sum valdømini nú hava. Jógvan Sundstein skrivar Tinghellukronikkin í dag!**



*Í Føroyum hevur verið nógv talað um at gera alt landið til eitt valdømi. Hetta fyri at fáa lokalpolitikkin burtur, tí nøkur meina, at hann er skaðiligur fyri samfelagið, serliga búskaparliga. Men er hann nú tað? spyr Jógvan Sundstein*

*Savnsmynd*

**TINGHELLUKRONIKK**
*Jógvan Sundstein*

Tað er nú gott og væl eitt ár síðani eg flutti til Danmarkar at búgva. Hesa tíðina havi eg roynt at fylgja við gongdini í Føroyum eins og eg sjálvandi fylgi við tí, sum hendir her á flatlondum.

Politiski leikpallurin hevur - ikki óvæntað - mín stóra áhuga. Bæði heima á landi og her niðri og eisini aðrastaðni í heiminum. Júst í hesum døgum fer orðaskifti fram á Løgtingi um løgmannsrøðuna, og tosað verður um stórmál: "Perspektivplanur 2015", einskiljingar, yvirtøkulógir og annað. Hetta ber til at koma aftur til í øðrum samanhangi.

Men tað, sum júst nú fekk meg til at fara í telduna, var ein heldur skemtilig framførsla í danska útvarpinum mikudagin, har ein fólkatingsmaður frá Sælandi legði eftir sínum starvsbrøðrum úr Jútlandi fyri teirra royndir at "skava inn undir seg" av motorvegum og líknandi útbyggingum. Fólkatingsmaðurin, Karsten Nonbo úr Vinstra flokkinum, er limur í bæði rættarnevndini og trafikpolitisku nevndini í Fólkatinginum. Hendan seinra nevndin skal ein av døgunum á vitjan í Jútlandi og kunna seg um ferðsluligar útbyggingar har. Men Nonbo gav boð um, at hann ikki kom við á hesa ferð, tí hann metti, at tað hevði størri týdning hjá honum at møta á fundum í rættarnevndini enn at fara at ferðast við ferðslunevndini. Ein grundgeving hjá honum var, at hann helt ferðsluna til og úr donskum fongslum vera størri enn ferðslan á jútsku motorvegunum. Hann var skemtiligur í sínum orðavali, og okkurt annað, sum hann segði, var, at ES gav studning til landbúnaðin fyri at leggja dyrkaða jørð niður. Tað helt hann jútlendingar kundu biðja um, og síðani leggja asfalt oman á jørðina, so vóru teir vissir í, at hon ikki aftur varð dyrkað.

Tað slapst heldur ikki undan, at teir tríggir fyrrverandi jútsku fólkatingsmenninir Helge Mortensen (Soc.), Kaj Ikast (Kons.) og Svend Heiselberg (Vinstra), sum vóru kendir fyri at útvega nógvar útbyggingar til Jútlands og vóru róptir "den jyske trafikmafia", vórðu umrøddir í útvarpssamrøðuni.

Samrøðan hevði við sær stóra øsing í Jútlandi. Onkur vildi vera við, at nú fór projektið um brúgv millum Danmark og Týskland (Fehmern) í vaskið, tí jútsku fólkatingsmenninir fóru "at hevna" seg við ikki at atkvøða fyri. Sjálvt um Nonbo vardi seg við, at alt varð sagt í skemti, stendur framvegis stórt stríð millum partarnar. Og partarnir eru ikki politisku flokkarnir, men lokalpolitikkarar úr ymisku landspørtunum. Vinstramenn úr Jútlandi geva partamanninum av Sælandi av grovfílini.

Tað, sum fekk meg at taka hesa hendingina fram, var, at føroysku løgtingspolitikkarar ofta verða settir fram sum lokalpolitikkarar burtur av, bæði í Føroyum og eisini av útlendingum, serliga dønum. Men hendan hendingin vísr týðuliga, at lokalpolitikkur er ikki ókendur aðrastaðni. Og hevur ein fylgt við í donskum politikki, ikki minst upp til seinasta fólkatingsval, er hetta ikki eindømi. Lokalpolitikkurin stendur í fullum blóma, bæði á Fólkatingi og ikki minst í teim nú komandi størri donsku kommununum.

Í Føroyum hevur verið nógv talað um at gera alt landið til eitt valdømi. Hetta fyri at fáa lokalpolitikkin burtur, tí nøkur meina, at hann er skaðiligur fyri samfelagið, serliga búskaparliga. Men er hann nú tað? Frammanfyri er nevnt um tað sokallaðu jútsku ferðslumafiuna. Hesir



*Um vallógin varð broytt til at samanlagt kunnu veljast 33 tingmenn (sum stýrisskipanarlógin loyvir) høvdu longu her verið 6 eykavaldir móti núverandi 5. Men harafturat kundi talið av valdømisvaldum í teim báðum fólkaríkastu valdømunum veri lækkað, sigur Jógvan Sundstein*

*Mynd: Bárður*